# Mín besta mynd

Eitt navn undir einari mynd. Vit síggja teir hvønn dag, uttan at geva okkum stórvegis far um teir. Myndamenninar, sum taka myndir, ið teir eru bidnir um at taka. Myndir í rúgvuvís. Myndir, sum hvørva í gloymskuni. Myndir, sum hefta seg. Men hvørja mynd høvdu teir valt, um teir vóru bidnir at velja eina heilt ávísa burturúr úr rúgvuni? Bara eina! Á hesum síðum geva nakrir av frægastu fotografunum í landinum tær eina mynd í jólagávu. Eina mynd, sum teir onkursvegna eru serliga glaðir fyri, at teir tóku.

Lagt til rættis: Ingi Rasmussen.



## Spentur hundur

Mynd: Jens Kristian Vang

Myndin er frá einari hundakapping á Royndarstøðini í Kollafirði, har kappast var um, hvør dugdi best at reka seyð. Jens Kristiani dámar væl myndina, tí tað sæst, hvussu spentur hundurin er. Hann gleðir seg, til tað verður hansara túrur at renna eftir seyðinum. Myndin er tikin við einum CANON EOS-1, og myndaðurin setti fototólið niður í grasið. Myndin er tikin við blitzi fyri at fáa tekningarnar í luftini við. Annars vóru fólkini vorðin ov myrk í mun til luftina, sigur hann. Jens Kristian Vang er myndamaður á Sosialinum.



## Nólsoyingur slotar eftir nátum

Mynd: Alan Brockie

Myndin er tikin um ársskiftið 1973 í Nólsoy. Alan hitti av tilvild hendan mannin, sum var farin út í lýsingini at vita, um onkur gamal havhestur kom rekandi framvið. Alani dámar myndina, tí hon er av einum meinigum manni og tykist óuppstillað. Maðurin er róligur, natúrligur, hyggur upp á luftina og ansar nóg illa, at myndamaðurin stendur beint hjá. Myndin er tikin við einum Nikon F1, og Alan hevur brúkt eina 24 mm víðvinkul linsu. Tað er spennandi, heldur Alan, tí tú fært verið heilt nær og fært kortini nógv við. Tað skapar dýpd og spenning. Alan er í dag free-lance fotografur við fastari avtalu við Dimmalætting.